UTTAN ÚR HEIMI

# Bin Laden biðið sínar egnu drepa seg



**Osama bin Laden fer heldur at lata sínar egnu drepa seg enn at verða tikin fangi.**

ÚTLAND

Saudiarabiska blaðið Al-Watan skrivaði í gjár, at Osama bin Laden hevur sagt nøkrum av sínum næstu medarbeiðarum, at teir skulu beina fyri sær, skuldi tað hent, at tað eydnast amerikanarum og bretum at avdúka, hvar hann heldur til.

Hann skal samstundis hava sagt, at sjálvur heldur hann segt bert hava nakrar dagar ella kanska nakrar vikur eftir.

Sambært blaðnum hevur bin Laden gjørt eina sjónbandsupptøku við sínum seinastu ynskjum, har hann eisini mælir øllum muslimum til at søkja at amerikanskum málum allastaðni. Ætlanin er, at bandið skal spælast, eftir at hann er deyður.

Bin Laden skal hava sagt, at hann fer ikki at lata amerikanarar, bretar ella hermenn hjá Norðursamgonguni beina fyri sær, og hann fer heldur ikki at lata seg taka til fanga. Tað seinna hevði verið ein sera dyggur ósigur hjá honum, skrivar saudiarabiska blaðið, sum vil vera við, at amerikanarar hava fingið nógvar upplýsingar frá Taliban-leiðarum, sum Norðursamgongan hevur tikið til fanga.

Leiðslan í Taliban heldur fast um, at hon veit ikki, hvar bin Laden er, og at einki samband hevur verið teirra millum seinastu tíðina.

Amerikanarar vilja vera við, at bin Laden og nakrir av monnum hansara fjala seg einastaðni har suðuri í Afghanistan, og nógvir servandir amerikanskir hermenn leita eftir honum saman við hermonum hjá Norðursamgonguni.

Amerikanska stjórnin segði týsdagin, at hon er til reiðar at senda hálvt triðja túsund hermenn afturat at leita eftir yvirgangsmanninum.

*(Fartekst)*

# NATO-kavbátar í svenskum sjógvi

**Tað vóru ikki einans sovjetskir kavbátar, sum sníktu seg inn í svenska skergarðin í áttati- og nítiárunum. Kavbátar hjá NATO vóru eisini har.**

ÚTLAND

Tað avdúkar fyrrverandi ovastin í teirri loyniligu kavbátaverjuni hjá svenska herflotanum, Leif Holmström, í svenska sjónvarpinum.

Tann loyniliga deildin, sum Holmström stóð á odda fyri, æt Musac, og hennara uppgáva var at halda eygað við tí, sum fyrifórst í svenska skergarðinum og at staðfesta alt óregluligt.

Í sjónvarpssamrøðuni segði fyrrverandi Musac-ovastin, at 99 prosent av kavbátafráboðanunum, sum myndugleikarnir fingu, høvdu einki við kavbátar at gera. Men av og á komu óbodnir gestir ov nær, og her var talan um kavbátar hjá bæði Warschawa-samgonguni og NATO, sigur hann.

Holmström sigur, at hann einaferð fekk munnliga at vita frá fregnartænastuni í einum NATO-landi, at ein av teirra kavbátum hevði verið innan fyri svenska markið. Hann vil ikki siga, hvat land talan var um.

-Vit hava prógvini, og teir hava munnliga viðgingið, at tað var so, sigur Leif Holmström.

Ein kanningarnevnd boðaði annars í síðstu viku frá, at tað ber ikki til at siga, hvaðani teir óbodnu gestirnir komu. Hesum er Holmström ikki samdur við nevndini í. Hann sigur, at hann hevur sjálvur kunnað kanningarleiðaran um, hvørji lond í NATO sendu sínar kavbátar inn í svenskt øki.

*(Fartekst)*

## Rúsevnisbønarnátt á Skálafjørðinum

RÚSEVNISNÝTSLA
*Ingrid Bjarnastein*

Samkomurnar á Skálafjørðinum hava gjørt vart við, at nýtslan av rúsandi evnum á Skálafjørðinum er alsamt vaksandi. Tað er ikki bert vaksin ungdómur, ið nýtir rúsevni, men talan er eisini um størri børn.

Talsfólkini frá teimum ymsu samkomunum vilja vera við, at tað eru teldu-caféirnar, ið hýsa »pusharunum«, tí tað er har børnini sita út á tann ljósa morgun.

Av tí, at hesin trupulleikin tykist at vaksa við rúkandi ferð, hava samkomurnar á Skálafjørðinum tikið stig til eina sokallaða rúsevnisbønarnátt, og verður hon í kvøld.

Ætlanin er her, at náttin skal vera forbøn burturav fyri rúsevnisviðurskiftunum, við serligum atliti til ungdómin á Skálafjørðinum.

Allar samkomurnar fáa ein tíma í part, sum tær skulu skipa fyri, men eisini er pláss fyri einstaklingum, um so er, at onkur hevur eitthvørt uppá hjartað. Eisini verður sangur og lovsangur.

Fyrireikararnir vóna, at fólk frá teimum ymsu samkomunum fer at taka væl undir við tiltakinum.

Bønarnáttin verður í Rórarneystinum niðri á Bakka á Glyvrum, byrjar í kvøld klokkan 23.00 og endar leygarmorgunin klokkan 6.00 við Morgundrekka.

Eru nakrir ivaspurningar, so ber til at ringja til Dagny Højgaard lærar, á telefon 449220.











# Sólrun vann valið



*Sólrun saman við familjuni. Maðurin og hon hava bæði verið nógv upptikin av valstríðnum seinastu vikurnar, og tað endaði eisini við sigri hjá teimum báðum*

**33 ára gamla Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen úr Havn er gift við næstformanninum í flokkinum Venstre, sum gjørdist stóri sigursharrin á fólkatingsvalinum týsdagin. Hon er sjálv virkin býráðspolitikari og hevur tí havt nakrar strævnar vikur undan valinum**

POLITIKKUR
*Stefan í Skorini*

Stór gleði var á Venstre-politikarunum týskvøldið, tá tað gjørdist greitt, at flokkurin hevði vunnið ein knúsandi sigur á javnaðarstjórnini við Poul Nyrup Rasmussen á odda.

Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen úr Føroyum er gift við næstformanninum í Venstre, Lars Løkke Rasmussen, og hon var sum vera man sera fegin um sigurin.

– Eg roknaði við einum stórum sigri, tí veljarakanningarnar undan valinum góvu Venstre stóra undirtøku. Hinvegin roknaði eg ikki við, at vit fóru at fáa so gott úrslit á amts- og kommunuvalunum, sum eisini vóru henda dagin, sigur ein fegin Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen eftir sigurin hjá hennara flokki.

Hon heldur, at fólk eru troytt av Nyrup og hansara politikki, og at Venstre er besta alternativið. Eisini vil hon vera við, at Nyrup hevur givið nógv lyfti, ið ikki eru hildin.

## Afturvald í býráðið

Eins og maðurin hevur Sólrun rikið dúgliga uppundir valið. Hon var nevniliga uppstillað í kommununi, har tey búgva.

– Hesar seinastu vikurnar hava verið ómetaliga strævnar. Børnini hava mest verið hjá ommuni og abbanum í Danmkark, tí eg og Lars hava verið upptikin av valinum. Nú valið er liðugt, skulu børnini aftur fáa sítt, lovar Sólrun, sum longu hevur lagt spennandi ætlanir fyri børnini.

Sólrun sigur, at tað er ein fyrimunur, at valstríðið var so stutt, men hinvegin verður lagt nógv fyri, tí alt skal náast.

Sólrun varð afturvald við 112 persónligum atkvøðum. Venstre fekk ellivu býráðslimir, og hon var nummar fýra á listanum. Hetta er aðru ferð, at Sólrun verður vald í býráðið í Gråsted, ið liggur norðanfyri Keypmannahavn.

Sólrun stillaði upp við seinasta val, tá maðurin tók seg úr býráðspolitikki. Hann gjørdist amtsborgarstjóri í Fredriksborg amt á Norðursæland fyri fýra árum síðani, og Sólrun tók so við í býráðnum eftir hann. Lars Løkke Rasmussen varð afturvaldur í Fólkatingið og kann halda fram sum amtsborgarstjóri, um hann vil. Tó er ein møguleiki fyri, at hann verður ein av ráðharrunum í nýggju stjórnini hjá Anders Fogh Rasmussen.

Maður Sólrun hevur sitið á Fólkatingi síðan 1993, og hann gjørdist næstformaður í flokkinum, tá Uffe Elleman Jensen tók seg aftur sum formaður eftir valið í 1998. Anders Fogh gjørdist formaður, og Lars er nú høgra hond hjá komandi forsætisráðharranum.

## Politisk familja

Sólrun er dóttir Jákup Petersen, lækna í Klaksvík, og Bergljót av Skarði, ið er lærari í Studentaskúlanum í Havn.

Hon er sostatt abbadóttir Sigurd Joensen, sála, ið sat á tingi fyri Tjóðveldisflokkin nøkur valskeið í fimmti- og sekstiárunum.

– Tað kann vera, at eg havi arvað áhugan fyri politikki, men eg má siga, at størsta ávirkanin hevur verið frá manninum, tí vit hava altíð tosað nógv um politikk heima við hús. Tað er haðani, eg havi fingið blóð á tonna, sigur Sólrun.

Hon lesur í løtuni til lærara og hevur enn trý ár eftir av útbúgvingini. Umframt lesturin arbeiðir hon sum stuðul hjá einum brekaðum nakrar tímar um vikuna. Eisini hevur hon sítt arbeiði í býráðnum at røkja.

Lars Løkke Rasmussen og Sólrun, sum hittust í 1989, eiga í dag trý børn. Bergur, sum er ellivu ár, Lisa er seks ár og Símun er fýra ára gamal. Tann yngsti er uppkallaður eftir langabbanum, Símuni av Skarði, ið yrkti tjóðsangin.

Sólrun vónar, at hon kann fara í starvsvenjing í einum føroyskum skúla og taka børnini við sær. Tey vitja annars javnan í Føroyum.

Sólrun hevur búð í Danmark í eini 14-15 ár. Áðrenn hon fór úr Føroyum fekk hon FHS-prógv á Handilsskúlanum í Havn. Síðani var hon í Onglandi í eitt hálvt ár og tók eftir tað HF-prógvið í Danmark.


